**Bygdaráðsfundur 30.01.2023 kl. 18.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 1/2023 – Filmur um Nes kommunu | ALMENT |
| Mál nr. 2/2023 – Skipan til skráseting av staðarnøvnum | ALMENT |
| Mál nr. 3/2023 – Køkur í ítróttarhúsinum á Svangaskarði | ALMENT |
| Mál nr. 4/2023 – Føroyar Live | ALMENT |
| Mál nr. 5/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 6/2023 – Umsókn um byggiloyvi til bilhús | ALMENT |
| Mál nr. 7/2023 – Umsókn um byggiloyvi til bilhús | ALMENT |
| Mál nr. 8/2023 – Umsókn um keyp av matr. nr. 418 | ALMENT |
| Mál nr. 9/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 10/2023 – Umsókn um byggiloyvi – Bústaðir | ALMENT |
| Mál nr. 11/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 12/2023 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 13/2023 – Býarheiti | ALMENT |
| Mál nr. 14/2023 – Íløgur á Svangaskarði 2023 | ALMENT |
| Mál nr. 15/2023 – | AFTURLATIÐ |

**Mál nr. 1/2023 – Filmur um Nes kommunu ALMENT**
J.nr.: 2204-1-2023

Landsbyfilm.dk hevur bjóðað seg fram at gera ein lýsingarfilm um Nes kommunu. Filmurin hevur til endamáls at røkka tilflytarum og at marknaðarføra kommununa.

Landsbyfilm.dk tekur sær av allari framleiðsluni. Eisini taka tey sær av at útvega fígging frá sponsorum o.ø. Nes kommuna fær tískil ongar útreiðslur av filminum.

Tá filmurin er liðugt framleiddur, verður hann ogn hjá Nes kommunu.

**Á fundi, tann 17.01.2023, mælir Mentanarnevndin til at kanna tilboðið nærri og annars at taka undir við at lata filmin um Nes kommunu gera.**

**Tilmæli hjá Mentanarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 2/2023 – Skipan til skráseting av staðarnøvnum ALMENT**
J.nr.: 2003-5-2022

**Tað varð einmælt samtykt at taka málið av skrá og beina tað aftur í nevnd.**

**Mál nr. 3/2023 – Køkur í ítróttarhúsinum á Svangaskarði ALMENT**
J.nr.: 2802-1-2022

Kommunan hevur fingið áheitanir um at umvæla køkin í ítróttarhúsinum á Svangaskarði. Umvælingin er serliga neyðug fyri at fáa góðkenning frá Heilsufrøðiligu Starvstovuni. Harafturat er nógv, sum treingir til ábøtur.

Tilboð er komið uppá nýggjan køk frá veitara ákr. 257.860 u/MVG. Harafturat er tilboð komið frá øðrum veitara á tilhoyrandi skuffur á kr. 19.120 u/MVG.

**Á fundi, tann 17.01.2023, mælir Mentanarnevndin til at taka av báðum tilboðunum á tilsamans kr. 276.980 u/MVG.**

**Á fundi, tann 25.01.2023, mælir Fíggjarnevndin til, at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini um at taka av tilboðunum á tilsamans kr. 276.980 u/MVG og at peningurin verður tikin av stovninum "Svangaskarð íløga".**

**Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 4/2023 – Føroyar Live ALMENT**

J.nr.: 1206-2-2023

Umboð frá Trygdartøkni vórðu á fundi í Teknisku nevnd. Tey greiddu frá á fundinum, at tey bjóða vevkamera fram í høgari góðsku. Tey hava longu sett vevkamera upp m.a. í Eysturkommunu og í Vestmanna. Ætlanin er, at menna ein platform har allar Føroyar verða vístar á einum stað. Somuleiðis er ætlanin, at Føroya Veðurstova skal verða knýtt at tænastuni, so at tað verður møguleiki hjá borgarum at fáa neyvari veðurvánir umvegis tænastuna.

Trygdartøkni hevur verið í samband við allar kommununar í Føroyum og vóna tey at seta vevkamera upp kring alt landið. Tænastan kostar mánaðarliga pr. Kamera.Trygdartøkni tekur sær av veiting og øllum viðlíkahaldi.

**Á fundi, tann 18.01.2023, mælir meirilutin í Teknisku nevnd, Dakko Petersen og Elin á Torkilsheyggi, til at gjalda fyri raksturin av einum kamera mánaðarliga og at seta tað upp á Svangaskarði.**

**Minnilutin í Teknisku nevnd, Jan Højgaard, mælir frá at seta upp kamera.**

**Á fundi, tann 25.01.2023, tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá meirilutanum í Teknisku nevnd og mælir til, at peningurin verður tikin av stovninum "Aðrar kommunalar útreiðslur".**

**Jan Højgaard setti fram broytingaruppskot um at nokta uppsetingini. Minnilutin, Jan Højgaard atkvøddi fyri broytingaruppskotinum. Meirilutin, Súni í Hjøllum, Heini S. Kristiansen, Dakko Petersen, Elin á Torkilsheyggi, Rannvá í Túni Petersen og Høgni Hansen atkvøddu ímóti broytingaruppskotinum.**

**Meirilutin, Súni í Hjøllum, Heini S. Kristiansen, Dakko Petersen, Elin á Torkilsheyggi, Rannvá í Túni Petersen og Høgni Hansen, atkvøddu fyri uppskotinum at seta upp kamera. Sostatt varð málið samtykt.**

**Minilutin, Jan Højgaard, atkvøddi ikki.**

**Mál nr. 6/2023 – Umsókn um byggiloyvi til bilhús - Daisy og Kunuunnguaq Iversen, ALMENT**
J. nr.: 234022-2-2018

Í umsókn tann 14.11.2022, søkja Daisy og Kunuunnguaq Iversen um byggiloyvi til bilhús og uppíbygging á matr. nr. 699w.

Uppíbyggingin skal verða norðurúr verandi sethúsum. Bygningurin er 7,9 m langur og 8 m breiður. Fremsti parturin skal nýtast til bilhús og hjall, meðan aftari parturin skal nýtast til kømur.

**Á fundi, tann 28.11.2022, mælir Tekniska nevnd til at tekniski leiðarin fer í samskifti við umsøkjaran um at gera broytingar, so at byggingin kann lúka viðkomandi treytir. Síðani verður málið lagt fyri aftur Teknisku nevnd.**

Síðani hevur kommunan móttikið grannasáttmála frá umsøkjarunum, dagfestur tann 02.01.2023.

**Á fundi, tann 18.01.2023, mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi og at loyva frávik frá byggistignum.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**<u>Mál nr. 7/2023 – Umsókn um byggiloyvi til bilhús – Hans Martin á Regni ALMENT</u>**
<u>J.nr.: 1201-2-2023</u>

Í umsókn dagfest, tann 03.01.23, søkir Hans Matrin á Regni um byggiloyvi til bilhús.

Bilhúsið skal byggjast norðanfyri sethúsini á matr. 473. Bygt verður eisini loft til goymslu. Bilhúsið verður 6,5 m frá vegnum, er 5 m breitt og 6 m høgt.

**Á fundi, tann 18.01.2023, mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi sambært innsendu skitsum.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**<u>Mál nr. 8/2023 – Umsókn um keyp av matr. nr. 418 ALMENT</u>**
<u>J.nr. : 1205-25-2022</u>

Í teldubrævi, dagfest tann 19.10.2022, heitir Búnaðarstovan á Nes kommunu um at ummæla jarðarkeyp av matr. nr. 418.

**Málið varð viðgjørt á fundi í Teknisku nevnd tann 16.11.2022 og aftur tann 18.01.23, tá Tekniska nevnd til mælir til at játta keyp av parti av matr. 418, frá sunnara markinum og 1,5m norð um bilhúsið.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**<u>Mál nr. 10/2023 – Umsókn um byggiloyvi – Bústaðir ALMENT</u>**
<u>J.nr.: 1201-4-2022</u>

Tann 11.11.22 søkir Bústaðir um byggiloyvi til búfelagsskap á matr. nr. 415o og 415p á Toftum. Talan er um ein bygning í trimum hæddum við 19 (18+1) íbúðum sambært tekningum 16.01.23.

Eftir fleiri fundir við Nes kommunu og gott samskifti millum Bústaðir, Teknistovan í Gøtu og Teknisku deild í Nes kommunu, er greitt, at staðsetingin og byggingin verður fyriskipað soleiðis, at pláss verður fyri 18 parkeringsplássum (16 vanlig og 2 til fólk við rørslutarni).

**Á fundi, tann 18.01.2023, mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi sambært seinastu tekningunum dagfestar 16.01.2023.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 13/2023 – Býarheiti ALMENT**

J.nr.: 1101-1-2023

Talið av borgarum í Nes kommunu fór uppum 1500 í desember 2022. Tann 20.01.2023 vóru 1509 borgarar í kommununi.

Fólkavøksturin í kommununi hevur við sær, at kommunan nú kann kalla seg bý. Kommunustýrislógin ásetir, at bygdaráðið hevur møguleika at kalla seg býráð, um íbúgvaratalið fer uppum 1500. Tó er hetta bert ein møguleiki og ikki ein skylda.

Um bygdaráðið velur at samtykkja býarheitið, hevur tað við sær, at borgarstjórin fær vígslumyndugleika. Tað merkir, at borgarstjórin hevur skyldu til at víga tey, sum ynskja tað, uttan mun til, hvar hesi eru borgarar. Borgarstjórin kann velja at útluta vígslumyndugleikan, um hann ikki sjálvur er tøkur.

Um broytingin skal fremjast, er neyðugt at broyta kommunustýrisskipanina fyri Nes kommunu.

**Á fundi tann 25.01.2023 mælir Fíggjarnevndin til, at Nes kommuna framyvir verður býur og at bygdaráðið fer at kalla seg býráð. Harafturat mælir nevndin til at taka spurningin um tal av bygdaráðslimum upp í januar í 2024.**

**Tilmæli hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 14/2023 – Íløgur á Svangaskarði 2023 ALMENT**

J.nr.: 2006-3-2023

Íløgur, sum liggja fyri framman á Svangaskarði, hava verið nógv umrøddar undir fíggjarætlanarviðgerðini fyri 2023. Javnan hevur málið verið umrøtt í Teknisku nevnd, Mentanarnevndini eins og í Fíggjarnevndini. Talan er um:

Vøll
Ljós
Skýli
Máltalva
El-tól, køkur viðl.
Vindeygu
Málgoymsla
Gummi til vøll

Støða skal takast til, hvat verður raðfestast fyrst í 2023.

**Á eyka fundi, tann 25.01.2023, mælir Tekniska nevnd til bíleggja 10 tons av gummi, og at gera neyðugar ábøtur á vøllin beinanvegin sambært tilráðingini frá Sportlabs. Harafturat mælir Tekniska nevnd til at raðfesta nýggj ljós í ár og beinanvegin at fara undir tær fyrireikingarnar.**

**Á fundi, tann 25.01.2023, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og at peningurin verður tikin av stovninum "Svangaskarð íløga".**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt, har tikið verður av einum tilboði, dagfest 27.01.2023, á kr. 299.950.**